FAROEXPO:

# Útflutningsráðstevna í Runavík í heystar

**Í oktober í ár fer ein nýggj ráðstevna av bakkastokki í Runavík. Hetta verður ein útflutningsráðstevna, sum hevur fingið heitið, FAROEXPO. Stigtakarar eru vinnulívsfólk í Eysturoy, og tað verður Sp.f Virkisráðgevingini sum fer at samskipa tiltakið. Runavíkar kommuna verður við til at skapa karmarnar og mentanarliga partin um ráðstevnuna**



*Í heystfrítíðini verður Runavíkin karmur ein eina útflutningsráðstevnu, sum hevur fingið heitið, FAROEXPO*

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er Eysturoyar Vinnulívsráð, sum er høvuðsstigtakari til hesa ráðstevnu, ið verður vitanar-, útflutnings- og mentanarrættað. Málið er, at vinnan og myndugleikar í Føroyum og uttanlands skulu fáa høvi at knýta gagnlig sambond og menna samstarv í einum mentanarligum umhvørvi. Á ráðstevnuni, sum verður hildin í ítróttarhøllini í Runavík og í Runavíkar skúla í oktober, verða eitt nú fyrilestrar um ymisk viðkomandi evni - útflutningsvinnuni at frama.

### Karmarnir skaptir

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, sigur, at ráðstevnan verður løgd í heystfrítíðini, tá ið skúlarnir hava frí.

Hann vísir á, at karmarnir um ráðstevnuna eru skaptir, og nú verður so farið at arbeiða neyvari við, hvussu sjálvt innihaldið skal verða.

- Ymskir tankar eru frammi um innihaldið, og tað er hetta, sum vit nú fara at arbeiða við.

Hann sigur, at ætlanina varð løgd fram á árliga fundinum hjá Eysturoyar Vinnulívsráði, sum var á Toftum herfyri, og har varð hon væl móttikin.

Borgarstjórin sigur, at samstundis, sum FAROEXPO verður í Runavík, verður eisini høvi at skipa fyri ymiskum mentanarligum tiltøkum í kommununi teir dagarnar, ráðstevnan varar.

- Vit hava lagt upp til at brúka ein part av okkara fíggjarætlan til ymisk mentanartiltøk, bæði stór og smá, og hetta hava vit gjørt, tí vit vilja staðfesta, at vit vilja nakað á hesum øki, sum hevur so stóran týdning fyri okkara samleika sum kommuna og sum tjóð.

Hann sigur, at mentanarligi parturin eisini verður við, soleiðis at tey, sum vitja kommununa á ráðstevnuni, kunnu hava eitt hvørt at stytta sær stundir við, samstundis sum tey fáa ein ávísan kunnleika um okkara mentan.

Ein partur av mentarligu tiltøkunum verða framsýningar og tiltøk av ymiskum slagi.



*- Vit hava nú skapt karmarnar fyri hesi útflutningsráðstevnu og hava soleiðis eina rammu. Nú er eftir at fylla út í hesar karmar, sigur borgarstjórin, Rodmundur Nielsen*

### Eingin profittur…

Rodmundur sigur, at útflutningsráðstevnan, sum tað liggur í heitinum, í fyrsta lagi byggir á at menna og kunna um okkara útflutning, og ætlanin er, at stevnan skal byggja á altjóða samstarv og sambond.

- Hetta verður ikki ein ráðstevna, sum fyrireikararnir skulu tjena upp á - skilt á tann hátt, at fíggjarorkan hjá hvørjum einstøkum virki, felag ella einstaklingi skal ikki halda nøkrum aftur í at koma. Vit ætla nevniliga, at luttakarakostnaðurin skal verða so rímiligur sum gjørligt.

Hann sigur, at hugsað hevur verið um at halda eina tílíka ráðstevnu í Runavík antin á hvørjum ári ella annaðhvørt ár.

- Vit hava eisini hugsað um, hvussu ráðstevnan í framtíðini kann skipast. Møguleikar eru at venda sær til marknaðin sum heild - ella til ávísar marknaðin og ávís øki.

Rodmundur sigur, at enn er endalig støða ikki tikin, hvagar henda ráðstevnan fer at venda sær, men hetta verður fingið upp á pláss í næstum.

### Spennandi tiltak

Borgarstjórin sigur, at hann vegna kommununa er rættiliga spentur eftir at síggja, hvussu ráðstevnan fer at taka seg út, tá ið saman um kemur.

- Vit vóna eisini, at ráðstevnan fer at skapa okkara vinnulívi, sum er fundamentið undir samfelagnum, nýggj sambond úteftir og nýggjar marknaðir.

Hann væntar tískil, at høvuðsvinnan fer at fylla ein stóran part av ráðstevnuni.

- Hetta verður okkara fyrsta tiltak av sínum slagi, og tí seta vit hesaferð heldur ikki nøsina upp eftir allari verðini, sum hann tekur til.

Rodmundur Nielsen sigur seg vóna, at stigtakararnir fáa einar 40 útlendskar fyritøkur og nakað tað sama talið av føroyskum fyritøkum at luttaka á stevnuni.

- Vit hava nú skapt karmarnar fyri hesi útflutningsráðstevnu og hava soleiðis eina rammu. Nú er eftir at fylla út í hesar karmar, sigur borgarstjórin sum væntar, at tiltakið fer at eydnast væl, tí tað eru góðar kreftir, sum standa aftanfyri.

# Veitslubrak í ítróttarhøllini í Runavík

**Leygarkvøldið, 19. februar klokkan 19.30, skipa fýra ítróttarfeløg í Runavíkar kommunu fyri stórari felags gallaveitslu í ítróttarhøllini**

GALLAVEITSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Leygarkvøldið, 19. februar, verður veitslubrak í ítróttarhøllini í Runavík við døgurða, undirhaldi og dansi. Hetta er fyrsta veitslan av sínum slagi í økinum*

Tað eru tey fýra feløgini, Tjaldur, Kappróðrarfelagið NSÍ, NSÍ og Støkk, sum standa aftanfyri stóra tiltakið.

Hetta er fyrstu ferð, at stig verða tikin til eina so stóra felags veitslu í økinum.

Nú Runavíkar kommuna er vaksin við trimum nýggjum kommunum, kundi kanska hugsast, at øll feløgini í nýggju kommununi vóru saman um tiltakið, men stigtakararnir siga, at tey í fyrsta lagi vilja vita, hvussu henda veitslan tekur seg út. Gongur alt, sum ætlað, er ætlanin, at samansjóða øll feløgini í stóru kommununi til gallaveitslu komandi ár.

### At samansjóða…

Stóra gallaveitslan, sum bæði er fyri fótbóltsspælarum, hondbóltsspælarum, róðrarfólki, fimleikarum og áskoðarum, verður 19. februar, og byrjað verður klokkan 19.30. Aldursmarkið er sett til 15 ár, og prísurin fyri atgongumerkini er 280 krónur. Sølan fer fram á Kunningarstovuni í Saltangará, og ætlandi verða atgongumerkini seld fram til í seinasta lagi, 16. februar.

Á Kunningarstovuni siga tey, at gallaveitslan er treytað av, at í minsta lagi 200 fólk tekna seg.

- Ætlanin við veitsluni er at samansjóða tey mongu og virknu ítróttarfólkini, sum eru á staðnum við einum felags tiltaki fyri øll. Tiltakið er eisini ætlað áskoðarum, viðhaldsfólki og stuðlum. Øll, sum búgva í gomlu Runavíkar kommunu og keypa sær atgongumerki, eru vælkomin, siga stigtakararnir sum vænta stóra undirtøku.

Tey vísa á, at tá ið veitslan verður skipað eftir hesum leisti, vænta tey nógv fleiri veitslugestir enn ann-ars til eina vanliga ársveitslu.

- Ætlanin er at styrkja vinarløg og samanhald millum tey ymsu ítróttarfólkini og feløgini.

### Døgurði, undirhald og dansur

Skráin ber bráð av røttum galladámi, har borðreitt verður við trimum rættum, sum Sjókaféin í Runavík stendur fyri. Tað verður Hilmar Jan Hansen, sum verður frásøgumaður, og ymisku feløgini fara at skipa fyri góðum undirhaldi. Eisini verður ein avmarkað kabarett um lokal viðurskifti á nøkulunda sama hátt sum á Eystanstevnu. Spælt verður undir felagssanginum, og at enda verður dansur við kenda bólkinum, Showmenn.

- Umframt tríggjar døgurðarættir, verður á veitsluni eisini høvi at keypa sær okkurt leskandi; tí verður eingin orsøk til at ganga svangur - ei heldur tystur, siga fyrireikararnir.